# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



*15. februar fingu Rebecca og Theresa eina lítla systir, sum eitur Sissal. Foreldrini eru Sølvi og Eyð og tey búgva í Frederikshavn.*

15. mars fingu Gunnvá Dragaberg og Jóan Petur Højsted, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3500 gr.

16. mars fingu Beinta Hansen og Thomas Joensen, Kollafirði, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3650 gr.

16. mars fingu Unn Paturson og Rógvi á Rógvi, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3770 gr.

17. mars fingu Angelina F. og Ólavur Sivertsen, Hvannasundi, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3500 gr.

18. mars fingu Maria og Kjartan Hansen, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 4000 gr.

19. mars fingu Kristbjørg og Petur Sigurð Petersen, Fuglafirði, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3650 gr.

19. mars fingu Ann Hjelm og Kári Christiansen, Fuglafirði, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3125 gr.

21. mars fingu Helen og Jógvan Olsen, Toftum, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 3975 gr.

22. mars fingu Feng Dai og Sigurd Jørgensen, Sørvági, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3950 gr.

23. mars fingu Kirstin og Oystein Ellingsgaard, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3500 gr.

23. mars fingu Ambjørg Tórbjarnardóttir og Pauli Justinussen, Skála, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3500 gr.

24. mars fingu Birna Mikkelsen og Hans Silvan Johannesen, Kollafirði, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4400 gr.

## Dagurin

**27. mars. Kastor.** Tær gomlu søgurnar nevna fleiri annars ókend halgimenni, sum itu Kastor og vórðu tikin av døgum 27. og 28.mars.

**28. mars. Eustachius**, deyður umleið ár 625. Abbati í kleystrinum Luxeuil í Fraklandi.

*Victor Danielsen varð føddur hendan dagin í 1894*

**29. mars. Jónas**, deyður umleið ár 326. Tikin av døgum í Persiu.

Navnið merkir *dúgva* ella er kanska ein stuttur formur av Jóannes.

## Minningarorð um abbabeiggjan

# Herjálv Schrøter Thomsen

### úr Sandvík

**29.03.1934 – 10.11.2003**

Tað er merkiligt at koma til Sandvíkar og síggja at tað er myrkt í Kviltini, tað plagdi tað sjálvdan at vera og so at koma inn til okkum og sita og bíða at hurðin skal ganga og at hoyra tey vælkendu ljóðleysu fetini. Men hurðin gongur ikki, ongin kemur inn at siga góða nátt sunnukvøld meira. Nú er alt hetta horvið.

Tú hevur altíð verið ein partur av mínum lívi, og nú er hesin parturin vekk, tað er bert eitt stórt tómrúm eftir, eitt rúm sum ongin kann fylla aftur.

Kongaríkið í Bábilon, liggur so langt frá Fjallafonn. Siglir tú longi og stýrir væl, hetta ríkið tú finna skal. Hesin sangurin og nógvar aðrar hevur tú lært meg.

Tá eg var lítil nanaði tú mær og sang fyri mær hvørt kvøld, tá ið tú var her, tað gjørdi ikki mun hvussu nógvum bamsum og dukkum eg kom við, tær skuldu eisini nanast.

Tá tú arbeiddi í Havn bíðaði eg spent hvørt fríggjakvøld, tí eg visti at so fekk eg okkurt, sum oftast var tað ein bók. Tú plagdi at lána bøkur til mín av Býarbókasavninum og so tókst tú tær norður aftur við, tá ið ein mánaði var farin. Einaferð hevði tú gloymt at taka bókina norður aftur við, og so fekst tú bót, tað bleiv eg ofta arga við, at tú mátti betala seks krónur í bót fyri eina bók, sum tú hevði lánt til mín.

Tað var líkamikið hvat eg bað teg gera fyri meg, so gjørdi tú tað. Einaferð bað eg teg gera mær eina látipípu, líka sum hana hjá »Lítlabeiggja« men vit fingu hana ikki at láta, men tú fann uppá ráð, Verning dugdi, so tú bað hann gera mær eina, og tá vildi hon láta.

Tað var eisini gott at koma inn til tín og fáa franskbeyð og mjólk, tað var bara tú, sum dugdi at gera tað til mín, tí fransbreyðið, sum abbadidd smurdi tað smakkaði ikki væl.

Eg kundi blivið við at fortalt um alt, sum vit upplivdu saman, men tað tekur alt ov langa tíð, men eitt er sikkurt, og tað er at minnini havi eg goymt í hjartanum og har fa ra tey altíð at vera.

Eg vildi bara ynskt at tú upplivdi at eg fekk eina dóttur, og at hon eisini kundi uppliva at havt ein barndóm saman við tær, líka sum eg hevði tað, men soleiðis skuldi iki vera.

Vit ráða ikki yvir tíðini her á fold, og nú var tín tíð at enda komin, men tað er bara so óftauligt at tú ikki er her hjá okkum meira.

Mánadagin hevur tú føðingardag, tú hevði blivið 70 ár, hetta var ein dagur, sum tú sá fram til men tað untist tær heldur ikki at uppliva.

Vit eru mong, sum sita eftir við stórari sorg og saknurin er ófatuliga stórur.

At enda vil eg takka tær fyri alt, sum vit høvdu saman.

Við hesum orðum vil eg lýsa frið yvir minninum um abbabeiggjan.

**Kristbjørg**

Meginfelag Føroyska Studenta:

# MFS havt ársaðalfund í Århus



*Nýggja MFS-ráðið. Aftara rað: f.v. Rúnar Reistrup, Helena D.Højgaard, Anna Rein, Annika H. Joensen, Nina Alberg Arge og Absalon Eysturoy.*

*Fremra rað: f.v. Jákup Sverri Kass, Jóhan Pauli Helgason, Petur Martin Hansen, Katrin D. Apol og Dann Jacobsen*

*Kelda: Fjølnir nr. 1, mars 2004*

Leygardagin 14. februar var árligi aðalfundurin hjá Meginfelag Føroyska Studenta hildin í Århus.

Ráðið skipaði seg soleiðis eftir aðalfundin: Formaður er Katrin D. Apol, stud. mag. í Medievidenskab, næstformaður er Helena D. Højgaard, stud. mag í Thai/Sydøstasienstudier, skrivari er Nina Alberg Arge, stud. ark., og kassameistari er Dann Jacobsen, stud. merc. AEF.

Hinir nevndarlimirnir eru: Absalon Eysturoy, stud. med., Anna Rein, stud. jur., Annika Helgadóttir Joensen, stud. psyk., Jákup Sverri Kass, stud. ling. merc., Johan Pauli Helgason, stud. polit, Margretha Petersen, stud. jur., Petur Martin Hansen, stud. polit., og Rúnar Reistrup, stud. mag í Informationsvidenskab.

Úr ráðnum fóru Jón Henriksen og Bjørg Dam, tey tóku ikki við afturvali. Nýggj í ráðnum eru: Dann Jacobsen, Nina Alberg Hansen og Margretha Petersen.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Karin Kjølbro 60 ár

Í dag, leygardagin 27. mars, fyllir Karin Kjølbro, sosialráðgevari, á Argjum 60 ár.

Karin er ættað úr Klaksvík. Hon tók studentsprógv í 1963 og bleiv útbúgvin sosialráðgevari í 1968 og alkoholráðgevari í 1994.

Hon sat á løgtingi umboðandi Tjóðveldisflokkin í Suðurstreymoy í nógv ár, fyrst sum varalimur frá 1970-74 og síðan sum valdur løgtingslimur frá 1978 til 1990, tá hon ikki stillaði upp aftur.

Hon var leiðari av Andveikraverndini frá 1969-71 og byrjaði heimflytingina av føroyingunum á Rødbygård til Føroya. Eisini var hon stigtakari til felagið Javna í 1971.

Frá 1972-76 arbeiddi hon á amtssjúkrahúsinum í Glostrup.

Síðan 1976 hevur hon verið leiðari á Kriminalforsorgini í Føroyum, og hon stovnaði felagið Barnabata í 1980.

Karin var stigtakari til Kvinnutingið, ið var frá 1979-83, og hon gjørdi fyrsta uppskotið um eina javnstøðunevnd, ið var lagt fyri tingið í 1979 av Ingrid Sondum.



Síðan 1996 hevur hon verið formaður í stýrinum fyri ALS og limur í stýrinum fyri Norðurlandahúsið í Føroyum.

Hon var blaðstjóri á 14. September frá 1983-84 og forkvinna fyri Kvinnufelagssamskipan Føroya frá 1990-93.

Hon hevur undirvíst nógv á skeiðum í kvinnupolitiskum høpi og verið stigtakari til at undirvísa í Alkoholpolitikki á arbeiðsplássum í Føroyum. Hetta var á Føroya Handilsskúla og nevndist: Starvsfelagin, vit tosa um men ikki við..

Síðani 2001 hevur hon verið limur í Kærunevndini í Almannamálum. Eisini er hon í herðaklappanevndini hjá Leikpalli Føroya.

Karin er dóttir Turid f. Thomsen, úr Skúvoy, og Poul Nolsøe Kjølbro, úr Klaksvík. Hon er gift við Ørvi Thomassen, sum eisini er ættaður úr Klaksvík

Karin eigur trý børn: Brynhild, sum býr á Velbastað og Bergtóru og Hanus, sum búgva í Keypmannahavn. Hon eigur eisini fýra ommubørn: tvíburarnar Karin og Beintu í Keypmannahavn og Niklas og Høgna á Velbastað

## John í Skemmuni 50 ár

Mánadagin 29. mars verður John í Skemmuni í Porkeri fimmti ár.

John er føddur og uppvaksin í Skemmuni í Porkeri. Hann er sonur Sigrid og Dánjal Poulsen, og er hann næstelstur av 4 systkjum.

John tók prógv á Føroya Læraraskúla í 1977, og var á bíbliuskúla í Onglandi frá 1977 - 1979.



Frá 1979 til 1987 arbeiddi hann sum lærari við Vágs skúla.

Síðan 1988 hevur hann arbeitt sum trúboðari í Føroyum. Hann hevur hesi árini verið við í leiðsluni fyri summarlegunum í Zarepta í Vatnsoyrum.

John er eisini virkin sum kórleiðari í felagskóri hjá brøðrasamkomunum í Suðuroynni, sum bleiv stovnað fyri tveimum árum síðan.

John er giftur við Rutt, dóttur Ásu og Róald Norðberg úr Vági, og eiga tey 4 børn: Sigrid, Pætur, Ásu og Evu.

Dagurin verður hildin heima frá kl. 16.00.

## Gullbrúdleyp

Í dag, 27. mars, hava Hanna og Eiler Thomsen, Vági, gullbrúdleyp.

Tey, ið ynskja at heilsa upp á gullbrúðarparið, eru vælkomin inn á gólvið hjá dóttrini Solgerd millum kl. 10–14.00.

Í dag, 27. mars, hava hjúnini Thordis og Karl Johan Hansen, Tórshavn, verið gift í 50 ár.

Dagurin verður hildin saman við børnunum.

## Brúdleyp

Í dag, 27. mars, kl. 17.00 giftast í Vestmanna kirkju Jóhanna Fonsdal og Pauli Zachariasen, bæði úr Vestmanna.

Í dag, 27. mars, kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Anja Johannesen og Egil á Bø.

Veitslan verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00.

Sunnudagin 28. mars kl. 8.00 giftast í Vesturkirkjuni Jóhanna O. M. Kristiansen í Havn og Kári á Rógvi á Argjum.

## 75 ár

Mánadagin 29. mars verður Malla Magnussen í Havn 75 ár.

Dagurin verður hildin saman við børnunum.

## Konfirmatión

Sunnudagin 28. mars verður Ásfinnur Sigvardsen, búsitandi í Hvidovre, fermdur í Vesturkirkjuni, Tórshavn.

Dagurin verður hildin í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum.

## Prógv

Jóannes Erhardt Næs Petersen hevur tann 10. februar á Keypmannahavnar Universiteti lokið prógv sum cand.mag. í enskum og samfelagsfrøði.

†

Kunngjørt verður, at kæri maður, pápi, verfaðir, abbi og beiggi okkara

**Páll Sverri Patursson**
bóndi, Kirkjubø

andaðist í heiminum tann 25. mars 2004, 60 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Kirkjubøar kirkju mánadagin tann 29. mars 2004 kl. 14.00.

**Sølvá**
**Jóannes, Pól og Sigert við familjum**

# Tøkk

Okkara inniliga tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálp, tá kæra kona, mamma og vermamma okkara

**Bergtóra Eidesgaard**
vanliga nevnd Begga, úr Vági

andaðist og varð jarðað.

Ein stór tøkk til tykkum á sjúklingahotellinum Torshavn.
Somuleiðis ein serstøk tøkk til starvsfólkið á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi og Meinigheitshúsinum í Vági fyri megnar hjálp til jarðarferðina.
Takk tit øll, sum hjálptu til annars.
Tøkk fyri blómur, kransar og heilsanir.
Eisini ein tøkk til prestin Jónsvein Bech og kirkjutænarar, sangarar og til tykkum øll, sum fylgdu Beggu til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Magni**

# Tøkk

Hjartans tøkk til øll tykkum, sum sýndu samkenslu og hjálptu, tá góði maður mín, pápi, verpápi, abbi, sonur og beiggi okkara

**Árni Nielsen**
Tórshavn

so brádliga andaðist.

Tøkk øll somul fyri umsorgan og alla góða hjálp í sambandi við jarðarferðina.

Ongin nevndur – ongin gloymdur

Tøkk øll, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Tórgerð**
**Helgi, Bogi og Terji**